# HEILSANIR



Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 9. mars, takka vit hjartaliga.
**Jonna & Jens Heri**



Vit vilja takka øllum, sum á ymiskan hátt vóru við at gleða okkum og gera hjúnabandsdag okkara tann 9. mai 2002 ógloymandi.
**Eyðgerð og Marner**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum við gávum, fjarritum og á annan hátt gjørdu hjúnabandsdag okkara tann 20.7.02 so góðan og eydnuríkan.
**Vinarligast Eyð og Thomas**





**Góða, fitta ólavsøku genta mín, hvør ert tú?**
Eg eiti Gutti. Ring til ommu, so fært tú eina mynd. Tlf. 422133



**Góða Ann-sviskan!**
Eg vil bara ynskja tær hjartaliga tillukku á tínum føðingardegi. Harrin signi framtíð tína.
**Heilsan ein vinkona**



**Góði, fitti Bárður**
Tillukku við tínum fyrsta ári. Alt tað besta ynskir
**Tórhallur**





**Góði, elskaði Andrias, maður og pápi**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 6. okt., sama dag sum dóttir okkara. Vit elska teg. Jesus veri hjá tær ynskja
**kona og børnini Ruth, Marin, Júst og Tordur**



**Góði Bárður**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum. Muss og klemm frá
**Andru**



**Góða, fitta Olina**
Hjartaliga tillukku við 14 ára degnum 7. okt. Eisini senda vit eina heilsan til ommudidd á hennara stóra degi 7. okt.
**Heilsan Annika og Barbara**



**Góða, elskaða Marin dóttir og systir**
Hjartaliga tillukku við 18 ára føðingardegnum 6. okt. Jesus pápi signi teg. Vit elska teg.
**Heilsan mamma, babba, Ruth, Júst og Tordur**



**Góða Majken**
Hjartaliga tillukku við 40 ára føðingardegnum.
**Starvsfelagarnir**



**Góði, raski Julian**
Tillukku við 3 ára føðingardegnum. Muss og klemm; eisini til tykkum Mattias og Ronju frá
**Val-ommu**



**Góða, fitta langomma**
Hjartaliga tillukku við 80 ára føðingardegnum. Takk fyri alt gott.
**Bestu heilsanir, Bárður**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mikudegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: .......................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**




# FØÐINGAR

24. sept. fingu Durita K. og Ólavur Sørensen, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 47 cm. og vigaði 2550 gr.

26. sept. fingu Unn Poulsen og Gisli S. Poulsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 49 cm. og vigaði 2924 gr.

26. sept. fingu Kirstin og Sofus Johannesen, Vestmanna, ein son. Hann var 56 cm. og vigaði 4040 gr.

26. sept. fingu Ida Jákupsdóttir og John S. Toftum, Vágur, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 4050 gr.

27. sept. fingu Arna Silvurstein og Aksel Johannessen, Hestur, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 3900 gr.

28. sept. fingu Kirstin og Petur Heðin á Fløtti, Argir, eina dóttur. Hon var 58 cm. og vigaði 4400 gr.

29. sept. fingu Anita Berg og Rúni Samuelsen, Toftir, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 4100 gr.

29. sept. fingu Rúna Olsen og Tony Davidsen, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 4070 gr.

Beinta og Heri Hansen, Toftir, hava fingið eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3550 gr.

29. sept. fingu Hanna og Tórheðin Jensen, Norðragøta, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 4100 gr.

29. sept. fingu Karin Wolles-Wardum og Meinhart Fríði Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3650 gr.

30. sept. fingu Benadikta og Sven Bergur Jensen, Keypmannahavn, ein son – Frede. Hann var 55 cm. og vigaði 4150 gr.

1. okt. fingu Ella og Torkil Heinesen, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm. og vigaði 3920 gr.

2. okt. fingu Guðrið T. Patursson og Jóannes Patursson, Kirkjubøur, ein son. Hann var 58 cm. og vigaði 4250 gr.

3. okt. fingu Alma og Emil Jakobsen, Skáli, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 4050 gr.

# ANDLÁT

**26. september**
Thyra Bertholdsen, í Vági, 87 ár
Leivur Jaocbsen, Augustenborg, ættaður úr Húsavík, 77 ár

**28. september**
Elia Danielsen í Miðvági, 70 ár
Vagn Nielsen, búsitandi í Ans í Danmark, fyrrverandi fotografur, 76 ár

**29. september**
Jona Samson Poulsen, Klaksvík, 71 ár

**1. oktober**
Hanna Olsen, Tórshavn, 82 ár
Herdis Justesen, í Norðdepli, 96 ár

# LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 5. okt.: Pól Jóhs. í Horni, tlf. 44 40 38
Sunnudagin 6. okt.: Sverri Lamhauge, tlf. 44 80 16

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

# TILTØK

**Gudstænastur leygardagin 5. oktober**
*Kirkja:* kl. 17, Elsa Funding

**19. sunnud. e. Trinitatis**
*Havnar kirkja:* kl. 11, konfirmatión, Henning Nielsen
*Vesturkirkjan:* kl. 11, konfirmatión, Heri Joensen
*Argir:* kl. 11, konfirmatión, Sverri Steinhólm
*Nólsoy:* kl. 12, altarg., Bjarni Bæk
*Hestur:* kl. 12, Erland Beder
*Sandur:* kl. 12, Meinhard Bjartalíð
*Tvøroyri:* kl. 11, altarg., Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini
*Sandvík:* kl. 17, altarg., Jónsvein Bech
*Sumba:* kl. 12, Marianne Telling
*Hvalvík:* kl. 12, altarg., Marjun Bæk.
*Broytt kirkjutíð:* Í Hósvík, Kollafirði og Haldórsvík verður nú farið í kirkju kl. 12.00
*Hattarvík:* kl. 12, Elsa Funding
*Viðareiðis kirkja:* Sunnudagin 6. okt. verður kirkjutíðin aftur broytt til kl. 12
*Sjóvar kirkja:* kl. 11, barnakór, Jóna Thomsen og Jógvan Fríðriksson
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen.
*Broytt kirkjutíð:* Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju á Eiði og við Norðskála kl. 12
*Christianskirkjan:* kl. 11 konfirmatión, talvan gongur fyri Guds orðs boðan. Niels Pauli Danielsen
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10,
*Haraldssund:* kl. 11.15, altarg.,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, konfirmatión, Martin R. Jacobsen
*Fuglafjørður:* kl. 11, altarg., Uni Næs
*Sørvágur:* kl. 11, David Johannesen

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 19.00-19.45 Bíbiltímin, kl. 19.45-20.15 Kaffisteðgur, kl. 20.15-21.00 Bønartímin.
Fríggjakvøldið kl. 18.00-19.30 ATAP Kids (Barnaklubbur).
Sunnudagin kl. 11.00 Familjumøti. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er skipað barnaansing, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og samstundis kl. 12.00 Møti, Sverri Steintún talar.
Mánadagin kl. 19.00 Hugnaløta teirra ungu. Heimasíða www.hebron.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Mánadagin kl. 20.30 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Magnus Simonsen, kl. 14.00 Sunnudagsskúlin.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Hósdag kl. 20.00 verður Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa v/ biskup Lukas de Hovre, S. J. Aftaná verður kirkjukaffi.
Sunnudagsskúli kl. 14.00.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, Palle Petersen talar, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Møti, har heimaforbundið stílar fyri, drekkamuður. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 17.00 og 19.00 Skótamøti.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, kl. 21.00 Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta fyri kvinnur. Kl. 19.30-22.00 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Axel Jacobsen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17.00 Landsbøn, kl. 20.00 Grøðingarmøti.
Í morgin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Kirkju og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og juniormøti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Sólborg Dulavík
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børnini.

**4. Grein skótar**
Vit møtast í KFUK mánadagin kl. 19.30 til spennandi ítriv.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.00 Møti.

**Jesus Kollveltingin**
Ungdómstiltakið Jesus Kollveltingin verður í kommunuskúlaauluni leygardagin 5. oktober kl. 22.00, øll eru vælkomin. Hevur nakar spurningar viðvíkjandi Jesus Kollveltingini, er viðkomandi vælkomin at senda okkum ein teldu-post:
Jesusk@post.olivant.fo

**Nazaret í Kaldbak**
Á møtinum sunnukvøldið kl. 18.00 talar Poul Færø.

**Saron, Vestmanna**
Hósdagin kl. 19.00 Frítíðararbeiði.
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti v/ Jón Miðberg.
Mánadagin kl. 20.00 Húsmøti hjá Binu og Jón.
Telefonandaktin 424741

**Vestmanna missiónshús**
Leygarkvøldið kl. 20.00 verður sangmøti í auluni í skúlanum við tónleikarum úr ymiskum bygdum.

**Eiði**
Emil Olsen, prestur, heldur fyrilestur í missiónshúsinum Karmel sunnukvøldið kl. 19.00. Evni: N. F. S. Grundtvig, prestur og sálmaskald. Nakrir av sálmum hansara verða sungnir.

**Keldan, Skálafirði**
Mikukvøldið kl. 20.00 Húsbólkamøti í Kelduni.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús v/ Jastrid Høj.
Sunnudagin kl. 17.00 Familjumøti. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Frá Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 17.00 Familjumøti.
Mánadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Týsdagin kl. 20.00, Glyvra-Hanusars hús, Bíbliutími: 1. Kor. 12 v. Petur O. K. Olofson.

**Elim, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 12.00 Breyðbróting og Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, Hjørleif Vang talar.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Alphaskeið/Bønarmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20.00 venur Felagskórið og Manskórið.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsongsløta, kl. 18.00 Møti, Felagskórið og Manskórið syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Sí, Guðs lambið, sum ber synd heimsins«.*
*Jeohs. 1,29*

Eitt hitt mest nýtta sagnorðið í Halgubók er »at síggja«.

Talan er í fyrstu atløgu um nakað sjónligt, visuelt, ið vit við eygunum kunnu síggja.

Og ymiskar eru sjónirnar, alt eftir, hvussu góð eyguni eru.

Í aðru atløgu er talan um, hvat hjartað sær. Og her hava verið, er, og kemur til allar tíðir at verða ymiskar fatanir. Tí tað, ið er ein sjálvfylgja fyri ein, kann hava djúpari týdning fyri ein annan!

Mong síggja Jesus við eygunum, meðan hann livir og hevur yrki sítt her á jørðini. Mong síggja í honum ein vanligan mann. Tey kenna foreldur og systkin hansara og enn fleiri ilskast inn á hann, tí hann sigur seg at verða son Guðs.

Men nøkur geva sær stundis til at steðga á og hyggja longur inn í spegilin, og her síggja tey myndina av hinum æviga Harra í honum.

Sum Káin, Jónas og Nastanael kunnu vit fjala okkum fyri ásjón Guðs. Og tað er onki at liggja omaná, at Guðs eygu mangan eru stingandi og gjøgnumtrongjandi, so at vit venda eygunum aðrar vegir.

Men Harrin kennir hin einstaka. Og júst tá vit í okkum sjálvum eru máttleys, og øll virðir her svíkja, tá kunnu vit geva okkum fult og heilt til Harran.

Lærusveinarnir síggja Jesus. Andreas kallar hann Messias. Filippus lýsir hann sum tann, ið Móses og profetarnir hava skrivað og vitnað um. Nattanael kallar hann »Sonur Guðs og konga Ísraels«. Hetta eru hugtøk, ið hava majestetiskan dám. Og endaliga kallar Jesus seg sjálvan fyri hann, ið eina og aleina er mentur at frelsa okkum.

Amen

**Andreas Andreasen**